# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nú hevur tú møguleikan, Edmund

Næsta mánadag verður Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður, avgerandi atkvøðan í Fólkatinginum, sum skal tryggja meirilutan hjá donsku stjórnini. Hetta hendir, tí mánadagin tekur Christian H. Hansen, sum er valdur fyri Dansk Folkeparti, aftur sæti í Fólkatinginum. Hann hevur verið í sjúkrafarloyvi við svárari sjúku. Hann segði við sjónvarpið hjá Danmarks Radio í síðstu viku, at hann hevði hugsað nógv um politikkin, sum stjórnin rekur. Hann fær eitt nú ikki tikið undir við klimapolitikkinum, og hevur fingið nóg mikið av tosinum um burka og annað, sum hann heldur als ongan týdning hevur í mun til allar sparingar í almannaverkinum.

Hóast Christian H. Hansen hevur boðað frá, at hann ikki fer at fella eina borgarliga stjórn uttan víðari, so er veruleikin kortini tann, at Edmund Joensen er garanturin fyri, at Danmark hevur eina borgarliga stjórn, og at Lars Løkke Rasmussen kann halda fram sum forsætisráðharri.

Føroyskir fólkatingsmenn hava tvær ferðir fyrr í nýggjari tíð verið í somu støðu. Fyrru ferð var, tá Óli Breckmann varð valdur á Fólkating í 1984. Boðskapurin hjá honum var, at hann ikki skuldi blanda seg í danskan politikk. Hann fekk kortini annað at sanna og mátti tillaga sítt politiska støðufestið til politiska veruleikan.

Seinna ferðin var, tá Jóannes Eidesgaard varð valdur á Fólkating í 1998. Hetta var mitt í stríðnum um bankaendurgjaldið – og tað at Jóannes Eidesgaard tryggjaði stjórnini hjá Poul Nyrup Rasmussen at halda fram, hevði eyðtivað sína ávirkan á milliarda endurgjaldið fyri bankakrædlið.

Edmund Joensen hevur rættiliga leikað í seinastu tíðina. Serliga um blokkin. Eitt er, at hann og Sambandsflokkurin ikki tóku undir við lækkingini í blokkstuðlinum, sum eisini var illa umhugsað. Men síðani hava allir flokkar uttan Sambandsflokkurin tikið undir við, at blokkstuðulin er frystur fastur. Edmund Joensen hevur víst á, at hetta eigur at verða broytt – ella »at blokkurin verður tiðnaður«, sum hann hevur málborið seg. Hetta hevði givið landskassanum eina eykainntøku í 100 milliónaklassanum á hvørjum ári.

Hóast Jóannes Eidesgaard, Kaj Leo Johannesen og Jørgen Niclasen hava vent tummilin niðureftir, so stendur Edmund Joensen fast við sítt.

Í løgtinginum hevur hann ikki stuðul fyri hesi ætlan. Hann hevur heldur ikki mandat til at leggja serligt trýst á. Men tað hevur hann í Fólkatinginum! Spurningurin er so bara, um Edmund Joensen meinar nakað við tað – og um hann torir at vera líka »treiskur« mótvegis Lars Løkke Rasmussen, sum hann er móti Kaj Leo Johannesen…

**Sosialurin**

## Fólksins vallóg

ZAKARIAS WANG



### Hvør skal gera vallógina?

Higartil hevur tað verið gjørt av høgum harrum. Hetta hendi, tá vit fingu smoygt ta fyrstu løgtingsvallógina niður yvir okkum í 1852. Hon var gjørd í kansalínum hjá einvaldskonginum, og síðani hevur tað verið løgtingið sjálvt, sum hevur gjørt smávegis broytingar í hesi einvaldsskipan.

Hesum er einki skil í. Ein stovnur kann ikki sjálvur áseta tær reglur sum avgera, hvør ið skal manna stovnin.

Hetta málið er fullkomuliga klárt. Tað er fólkið, sum er arbeiðsgevari hjá løgtinginum og tí skal tað sjálvsagt vera fólkið, sum ger av eftir hvørjum reglum løgtingið skal mannast.

Men hvussu skal fólksins rødd hoyrast?

Vit kunnu hvør í sínum lagi royna at koma við uppskotum, men hvør skal avgera, hvørji uppskot skulu verða samtykt?

Her er vert at minnast til, at fyrr hevði løgtingið ein eiðsvornan skrivara, sum skuldi skriva rætta frásøgn frá løgtingsfundum í gerðarbókina. Nú útinna onnur hetta starv, men framvegis hava vit sorinskrivara í Føroyum. Hann er óheftur av løgtinginum og hví ikki nýta hann fyri at fáa málið á røttu kós?

Ein gongd leið hevði verið at samtykt soljóðandi løgtingslóg:

§ 1. Álagt verður sorinskrivaranum at seta nevnd at koma við uppskoti til løgtingsvallóg.

§ 2. Sorinskrivarin skipar landið í 33 partar, sum hvør hevur eins nógvar íbúgvar. Í hvørjum at hesum pørtum verður við lutakasti avgjørt, hvør ið skal umboða íbúgvarnar í vallógarnevndini.

§ 3. Nevndin skal innan eitt hálvt ár handa sorinskrivaranum uppskot til løgtingsvallóg, og skipar hann fyri fólkaatkvøðu um uppskotið. Atkvøðurnar verða taldar upp undir einum. Eru fleiri atkvøður ímóti enn fyri uppskotinum, er tað fallið. Tá skipar sorinskrivarin fyri, at onnur nevnd verður sett at koma við nýggjum uppskoti.

Verður henda leið gingin, er tað fólkið í hesum landi sum hevur ásett tær reglur, sum løgtingið verður mannað eftir. Hvussu reglurnar verða kann eingin siga frammanundan, men øll mugu boyggja seg fyri teimum, og tað man fara at vera seinur dagur, at tær aftur verða broyttar.

## ABC-meirilutin letur lógarbrot fyrnast

KÁRI Á RÓGVI
løgtingsmaður



Síðsta summar sendi landsstýrismálanevndin tingfólki tvinnanda brøv, har niðurstøðan var, at lógarbrot vóru framd, men landsstýrismálanevndin fór ikki at gera meira við málini. Hetta tyktist sum roynd at krógva málini, kanska tí samgongan eigur meirilutan í nevndini.

Kári á Rógvi løgtingsmaður sendi tí inn formliga klagu um Jóannes Eidesgaard við áheitan á nevndina um antin at taka stig til at seta kanningarstjóra ella reisa formliga ákæru, so fyrrverandi løgmaður fekk høvi at verja seg móti teimum skuldsetingum, sum landsstýrismálanevndin setir fram.

Landsstýrismálanevndin hevur nú staðfest, at lógarbrot eru farin fram, at grundarlag er fyri ábyrgdan eftir lóg um ábyrgd landsstýrismanna. Nevndin sigur A men vil tó ikki siga B. Hesuferð roynir nevndin at krógva málið við viðmerkingum um, at 'øll landsstýrisfólk bróta lógina'.

Sjálvstýrisflokkurin hevur ikki umstøður at gera meira við málið, tí flokkurin hevur ikki umboð í teimum nevndum hjá løgtinginum, sum hava heimildir at seta seg til fulnar inn í málini, fíggjarnevndini, løgtingsgrannskoðanini og landsstýrismálanevndini. Flokkurin royndi eftir síðsta val at fáa sæti í løgtingsgrannskoðanini, men teir stóru flokkarnir tulka lógina soleiðis, at til ber ikki hjá Sjálvstýrisflokkinum at raðfesta grannskoðanina. Bæði landsstýrismálanevndin og løgtingsgrannskoðanin dragast sostatt við gegnistrupulleikar, ið mugu bøtast við lógarbroyting.

Men eftir stendur, at landsstýrismálanevndin vil ikki taka konsekvensin av sínum niðurstøðum. Skuldsetingar hennara móti landsstýrisfólki verða tí hangandi sum svørt skýggj omanfyri politiska skipanini. ABC-meirilutin á tingi hevur nú uttan skomm tikið meir inn frá fólki enn heimilað, hevur goldið meir út enn játtað, og nú himprast meirilutin heldur ikki við at lata lógarbrot fyrnast heldur enn at lata tey fáa avleiðingar.

Einasta, sum vanlig tingfólk fáa gjørt, er nú at reisa málið sum skrivligan fyrispurning til løgmans. Tí løgmaður hevur eftir lóg um ábyrgd landsstýrismanna bæði medábyrgd fyri lógarbrotum hjá øðrum landsstýrisfólkum og heimild at reisa ákæru mótvegis landsstýrifólki.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.